# Tobbi spyr um leiklutin hjá tyrluni í vanlukku

**Torbjørn Jacobsen vil hava at vita frá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, hví føroyska sjóbjargingartyrlan ikki beinanvegin varð send avstað, tá ið Jøkulfell sakk í ein landnyrðing úr Fugloynni, og seks mans fórust**

VANLUKKA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tann 7. februar fórst íslendska farmaskipið Jøkulfell einar 55 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni. Fimm mans vórðu bjargaðir, meðan seks fórust í vanlukkuni.

Nú er tilburðurin endaður í løgtinginum, tí løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen hevur boðað frá einum munnligum fyrispurningi til Bjørn Kalsø, landsstýrismann við fiskivinnumálum, sum væntandi skal svarast mikudagin.

### Hví skuldi tyrlan bíða?

Torbjørn Jacobsen vil hava at vita, hvussu long tíð gekk frá tí, at neyðarkallið var komið frá Jøkulfell inn á Sjóbjargingarstøðina, til føroyska sjóbjargingartyrlan fór á flog úr Vágum.

Løgtingsmaðurin vil eisini hava at vita, hví føroyska tyrlan ikki varð send avstað beinanvegin, ella tá ið hon var búgvin at fara á flog, soleiðis sum tað stóð at lesa í Dimmalætting eftir vanlukkuna.

### Í andsøgn til andan í tilbúgvingini

Torbjørn Jacobsen vísir á, at ein heil skipsmanning var í vanda, men føroyska sjóbjargingartyrlan sambært frásøgnunum fekk boð um at bíða í Vágum. Seinni var hon so send avstað at leita eftir monnunum.

– Hetta stendur eitt sindur í andsøgn til andan í allari tilbúgving, soleiðis sum vanligi maðurin skilir støðuna, serliga tá ið neyðarkall er sent av søkkandi skipi, og vanligt skil sigur øllum, at tað tá stendur um lív hjá eini heilari skipsmanning, soleiðis sum tað eisini skuldi vísa seg at gera í hesum førinum, sigur Torbjørn Jacobsen í viðmerkingunum til fyrispurningin hjá sær.

## Tingmenn hava úr at gera

**Nógv mál standa á skránni til løgtingsfundirnar hesa vikuna, og harafturat plaga nógv nýggj uppskot at verða løgd fram beint áðrenn freistina 5. mars**

LØGTINGIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Løgtingsmenn fara ikki at keða seg til arbeiðis hesa vikuna. Ein rúgva av málum skulu til viðgerðar í løgtinginum, ein heilur dagur er settur av til munnligar fyrispurningar, og fríggjadagin er seinasti møguleikin at leggja nýggj uppskot fyri tingið í hesari tingsetuni.

Týsdagin vóru seks løgtingsmál til viðgerðar, og seinnapartin mikudagin er tíðin sett av til munnligar fyrispurningar frá løgtingsfólki, og tað plagar at skapa bæði nógv og fjølbroytt kjak.

### Freistin hesa vikuna

Hósdagin standa 9 tingmál á skránni fyri løgtingsfundin, umframt at ófráboðaðir fyrispurningar kunnu setast, og fríggjadagin koma fýra mál fyri.

Umframt alt hetta verður hendan vikan eisini merkt av, at seinasti framløgudagur nærkast, og vanligt hevur verið, at nógv nýggj uppskot verða løgd fyri tingið í evstu løtu.

Sambært tingskipanini skulu uppskot verða løgd fyri løgtingið áðrenn 5. mars, og seinasti tingfundurin áðrenn hesa freist er fríggjadagin.

# Skúlakonsertir skulu kveikja tónleikarar

**Eitt nýtt felag skal bjóða fram livandi tónleik og verkætlanir í skúlanum. Hetta kann geva børnunum íblástur og skapa áhuga fyri tónleiki, heldur arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt álit um rútmiskan tónleik í Føroyum**



*Føroyskir tónleikarar skulu verða við til at kveikja áhugan fyri tónleiki og framførslum við at spæla fyri skúlabørnum, heldur arbeiðsbólkur*

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Besti háttur at geva børnum íblástur og skapa virðing er at lata tey upplíva (yrkis)tónleikarar í skúlastovuni ella á tónleikapallinum.

Tað stendur at lesa í álitinum rútmiskan tónleik í Føroyum, sum í farnu viku varð handað landsstýrismonnunum við mentamálum og vinnumálum.

Ein arbeiðsbólkur hevur í hálvtannað ár kanna føroyska tónleikalívið, og arbeiðið endaði við einum áliti, sum nú er latið avvarðandi myndugleikum.

Ein av tilráðingunum í álitinum er nýtt felag ella átak, sum kallast »Durur«. Hetta felag skal skipa fyri framførslum og verkætlanum í skúlum

– At fáa okkurt nýtt inn um skúlagátt skapar áhuga í sjálvum sær, men tað ger næmingarnar eisini tilvitaðar um tónleik sum ein skapandi førleika, heldur arbeiðsbólkurin.

– Tað hevur eisini týdning fyri tónleikaran at hava aðrar framførslupallar og áhoyrarar enn á vanligu, kvøldligu spælistøðunum.

Hetta snýr seg eisini um eina uppalandi frálæru og medvit um tónleik, tónleikasøgu, ástøði og annað.

### Nýggjan samskipara

Arbeiðsbólkurin heldur, at fleiri møguleikar eru at skipa tónleikaligu tilboðini til skúlarnar.

Ein møguleiki hevði verið Føroya Musikkskúlaskipan, har ein persónur situr og samskipar ymisku tiltøkini og tilboðini. Virksemið kundi eisini komið undir virksemið hjá Konsertfelagnum. Og uppaftur ein annar møguleiki kundi verið eitt samstarv við Landsmiðstøðina, sum millum annað hevur til endamáls at veita skúlum tilfar, soleiðis at tað er námsfrøðiliga væl lagt til rættis og viðgjørt, heldur arbeiðsbólkurin.

Í álitnum um rútmiskan tónleik verður ført fram, at hetta átakið kundi verið fyrireikað longu í ár, so tað kom at virka frá komandi skúlaári.

# Selja listarverk á uppboði

**Leygardagin verður uppboðssøla av listarverkum í Klaksvík. Í tríggjar dagar frammanundan kunnu verkini, sum Amariel Norðoy, Anfinn Kallsberg, Torbjørn Jacobsen og onnur hava málað, síggjast á framsýning í Café KÍ**

UPPBOÐSSØLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin hevur Klaksvíkar Ítróttarfelag uppboðssølu av listarverkum. Hetta tiltak er áður roynt við góðum úrsliti, og nú verður ein nýggj roynd gjørd.

Mikukvøldið letur framsýningin av verkunum upp, og listin hjá royndum listarmonnum og øðrum kendum persónum kann síggjast í Café KÍ fram til leygardagin. Tá ið framsýningin letur upp mikukvøldið, fara limir úr bólkinum I Am at spæla. Leygarkvøldið kl. 19.00 verður so sjálv uppboðssølan, har øll kunnu bjóða upp á verkini.

Tað er ein røð av kendum listarmonnum og kendum persónum, sum ikki hava útmerkað seg við málningalista áður, sum hava málað málningarnar.

Amariel Norðoy og Eli Smith er millum tey kendu listarfólkini, men fólk sum Anfinn Kallsberg, Torbjørn Jacobsen, Jastrid Gullaksen, Jákup Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen og Bjørn Kalsø eisini royna seg við penslinum.